

Savnsmynd

## Øll afturvald

Leygardagin hevði Starvsmannafelagið aðalfund á Platform.

Har varð Gunnleivur Dalsgarð afturvaldur til formann í Starvsmannafelagnum.

Hóast onki mótvalevni er, skal atkvøðast og formaðurin skal hava yvir 50% av atkvøðnum. Tað fekk Gunnleviur Dalsgarð væl og virðiliga

Nevndarlimirnir Heini Joensen og Súni Selfoss stóðu fyri vali, og eisini teir vórðu afturvaldir. Til eykalimir vórðu vald Eimi Fossdalsá og Kartni Ravnsfjall.

Aðalfundurin samtykti eisini eina lóg, sum hevur til endamáls at styrkja Starvsmannafelagið. Higartil hevur bara formaðurin verið løntur formaður. Men nú hevur aðalfundurin samtykt, at eisini onnur í felagnum, kunnu fáa løn í styttri tíðarskeið til ávísar uppgávur

Beint eftir aðalfundin í Starvsmannafelagnum varð eisini aðalfundur í Samlagstryggingargrunninum. Har varð eisini nevndarval á skránni, og allir tríggir: Gunnleivur Dalsgarð, John Kjær og Jákup Danielsen vóru afturvaldi í nevndina fyri Samlagstryggingargrunnin.




# Stúra fyri uppsagnum

**Tað henda so stórar broytingar bæði hjá landi og kommunum, at vandi fyri uppsagnum lúrir, sigur Starvsmannafelagið**

ALMENN STARVSFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Enn er ikki talan um uppsagnir. Men vandin lúrir.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður i Starvsmannafelagnum ætlar sær at verða á varðhaldi í komandi tíðum.

Á aðaldundinum hjá Starvsmannafelagnum leygardagin, greiddi hann fundarfólki frá teimum stóru broytingunum, sum eru hendar og fara at henda, bæði hjá landinum og hjá kommununum, har Starvsmannafelagið hevur nógvar limir.



*– Enn er ongin uppsagdur, men tað henda so stórar broyhtingar, at vasndin lúrir og tí mugu vit øll vera á varðhaldi, segði Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum á aðalfundi í felagnum leygardagin*

### Setti tryggleikan til viks

Formaðurin í Starvsmannafelagnum helt, at tað kundi sloppist undan trupulleikum, um Anfinn Kallsberg hevði víst meiri ábyrgd, tá ið hann útskrivaði Løgtingsvalið.

– Tað kann ikki góðtakast, at fíggjarlógin ikki varð gjørd, áðrenn avgerðin um nýval varð tikin, tí øll vistu, at tíðirnar fóru at versna segði Gunnleivur Dalsgarð.

– ikki minst er hetta løgið og ørkymlandi, tá ið hugsað verður um, at avgerðin um nýval eina og aleina bygdi á persónlig viðurskifti, legði hann afturat.

Hann sigur, at hetta hevur eisini sett síni spor á gongdina at skipa ein fíggjarligan karm, tí nýggja samgongan skuldi at kalla byrja av nýggjum.

Hann sigur eisini, at fráboðanir frá samgonguni benda eisini á, at tað verður ein ein tungur burður at gera eina fíggjarlóg. Hetta fer eisini at hava við sær ógreið viðurskiftir við sær og fer at gera, at ótryggleiki fer at valda alt árið.

– Ongin ivi er um, at hetta eisini kann órógva og hava sera óhepnar avleiðingar fyri limir okkara. Og seinasti boðskapurin frá løgmanni er eisini, at vit kunnu vænta uppsagnir í komandi tíðum, segði Gunnleivur Dalsgarð.

Hann segði, at øll hava krav uppá at fáa tryggleikan og virðingina aftur í hásæti. Og hann vónaði at nýggja løgtingi og landsstýri, fær hetta aftur á rættkjøl.

### Leggja alla orku í

Gunnleivur Dalsgarð vísir eisini á, at vit nú hava fingið tvey ráð færri í almennu umsitingini. Eisini hetta fer uttan iva at hava munandi broytingar við sær, kanska við uppsagnum.

Hann helt, at tað er ein trupul spurningur at loysa, tá ið arbeiðsøki hvørva og starvsfólk kanska verða til avlops.

– Men tað er rættuliga greitt, at sjálvt um aðalráðini eru færri, verða arbeiðsuppgávur óbroyttar. Tí er at vóna, at størv ikki detta burtur, men at loysnin verður heldur, at fólk verða flutt í onnur størv.

– Hetta er eisini hent. Hetta verður sjálvsagt ikki uttan trupuleikar, men vit fara so at leggja alla orku í at forða fyri, at broyting ikki fer at hava óneyðugar uppsagnir við sær, segði formaðurin í Starvsmannafelagnum á aðaldundinum.

Men hann segði eisini, at Starvsmannafelagið mátti vera á varðhaldi, tí nógv arbeiðspláss eru mannað við hálvum og heilum akademikarum.

– Vit mugu verða vakin, so at okkara limir ikki verða skumpaðir út og arbeiðsøkini verða yvirtikin av hesum kreftum, segði Gunnleivur Dalsgarð.

Hann segði, at felagið fór eisini at venda sær til løgmann fyri at gera støðuna greiða fyri honum. og hann helt eisini, at tað var sjálvsagt, at myndugleikarnar ikki fara framm eftir fummum her, men seta seg í samband við allar avvarðandi partar, áðrenn nøkur avgerð verður tikin.

Hann vísti eisini á, at samanleggingin av kommununum, kann ávirka limirnar hjá Starvsmannafelagnum.

– Uppgávur, sum áður hava ligið undir landinum, vera uttan iva fluttar í kommunala umsiting. Hetta kann hava óhepnar avleiðingar við sær fyri tað einstaka starvsfólkið.

– Tí er beinleiðis neyðugt, at Starvsmannafelagið og onnur fakfeløg, verða tikin við uppá ráð, áðrenn endaliga er stungið út í kortið.

– Hetta ger seg eisini galdandi í teimum førum, tá almenn arbeiðspláss verða flutt úr einum til annan part av landinum.

Hann sigur, at Starvsmannafelagið hevur gjørt landsins mynduleikar varugar við hesi viðurskiftir áður. Men tað er synd at siga, at teir hava lurtað nóg væl.

– Vit vóna at nýggju fólkini í landsins stýri fara at geva hesum spurningi størri ans og ikki taka illa undirbygdar avgerðir, yvir høvdinum á starvsfólkunum, segði Gunnleivur Dalsgarð fyri aðalfundinum.

### Havnin stýrir øllum

Formaðurin fýltist eisini á, at kommunurnar eru so truplar at samstarva við, tær alla tíðina lovprísa starvsfólkunum og fortelja, hvussu stórt álit og virðing, tær hava fyri tí arbeiði, starvsfólkini gera.

– Trætan við Tórshavnar kommunu um jarðarferðir og læknaørindi, eru aftur ein staðfesting av hvussu ómetaliga torført, fyri ikki at siga vónleyst, tað er at samstarva við kommunurnar. Gunnleivur Dalsgarð sigur, at í veruleikanum eru kommunurnar stýrdar frá ovastu leiðsluni í Tórshavnar kommunu, tí tað, sum Tórshavnar kommuna fer, breiðir seg um alt landið, samstundis sum umsitingin í kommunala arbeiðsgevarafelagnum hyggur at, uttan at gera nakað sum helst við at fáa viðurskiftini í rættlag.

– Her lekur milt sagt ímillum teori og praksis, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum á aðalfundinum.

Bilar
Nr. 44 • hósdagur • 4. mars 2004 • 78. árg.

# Lastbilakvøld á bátasavninum í Leirvík

**Í sambandi við at VR Bilar nú umboða svensku JOAB útgerðina til lastbilar, var skipað fyri einum lastbilatiltaki á bátasavninum í Leirvík seinasta mikukvøld. Umleið 70 mans frá ymiskum stovnum og fyritøkum møttu hetta kvøldið**



*Sofus Gregersen, frá KJ-Hydraulik á Kambsdali, greiddi frá teirra arbeiði við lastbilum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mikukvøldið 25. februar skipaðu VR Bilar í Havn fyri einum lastbilakvøldi á bátasavninum í Leirvík. Umleið 70 mans ymsastaðni frá møttu hetta kvøldið í kavaveðrinum.

Uttan fyri stóðu fleiri ymiskir Volvo lastbilar, trailarar, tangabilar og bilar viðskiftilast, teir stóðu har sum framsýningarbilar.

Stjórin á VR Bilum, Sverri Steintún, beyð vælkomin og segði frá um avtaluna, teir høvdu gjørt við svensku JOAB fyritøkuna.

Gestirnir fingu smyrjibreyð og høvið at tosa saman, meðan ein filmur um nýggja Volvo FH eisini varð vístur.



*Sverri Steintún, stjóri á VR Bilum, beyð vælkomin, og segði frá um avtaluna teir høvdu gjørt við JOAB í Svøríki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Síðan fekk sølumaðurin hja JOAB, Jens Jensen, orðið. Jens er hálvur føroyingur og hálvur dani. Hann hevur búð í Svøríki síðan 1951 og arbeitt í fyritøkuni síðan 1969.

Hann greiddi frá, at fyritøkan varð stovnað av Jan Olsson í 1963, harav navnið JOAB.

Fyritøkan hevur specialiserað seg í at gera skiftilastsskipanir til lastbilar, soleiðis at teir kunnu skifta ímillum ymiskar lastir, byngjur o.a. Teir gera skiftilastsskipanir v. króki til bilar í støddum frá 5 til 24 tons.

Eisini gera teir lastbilar klárar við at montera kranar, skermar og ymiskt annað sum kundarnir ynskja. Teir levera bilar til Skandinavia, Norðurlond og nógva staðni í Evropa. Hjá JOAB arbeiða umleið 100 fólk.

Sofus Gregersen frá KJ-Hydraulik á Kambsdali, ið umboða Palfinger-kranar, greiddi síðan frá teirra arbeiði við lastbilum. Umframt at teir selja og montera kranar, eru teir eisini serfrøðingar innan hydraulik, og teir eru væl útgjørdir til at gera umvælingar og umbygging av lastbilum.

Seinni var farið útum at hyggja at teimum ymisku lastbilunum, hvussu alt virkaði í praksis, hvørjir møguleikar vóru við t.d. kranunum og skiftilastsskipanum, byngjur vórðu lyftar av og á lastbilarnar.

Eisini var høvið at seta spurningar.

Eitt áhugavert og hugnaligt kvøld endaði við kaffi og VR-lagkøku. Teir sum komnir vóru úr Vágum skundaðu sær heim, áðrenn Leynatunnilin lukkaði kl. 23.00, og teir sum skuldu til Klaksvíkar fóru við Ternuni kl. 22.45.



*Møguleiki var fyri at síggja hvussu skiftilastskipanin virkar í praksis*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Jens Jensen frá JOAB greiðir her Gunnari Dølum frá skiftilastskipanini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*